**80 ára føðingardagur**
Leygardagin 26. apríl verður Nicolina Jensen Beder 80 ár. Dagurin verður hildin í AB-húsinum frá kl. 11-15. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**

Leygardagin 26. apríl hava hjúnini Marna (fødd Vandsdal) & Leivur Dorup Hilbert Egholm, Hvalvík, verið gift í 50 ár. Dagurin verður hildin saman við systkjum og børnum v/ familju á Hotel Tórshavn. Frá kl. 19.00 verður opið hús í Missiónshúsinum í Hvalvík til ein drekkamunn. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Gullbrúdleyp**
Sunnudagin 8. juni hava Sanna og Ivan Johannesen í Miðvági gullbrúdleyp. Leygardagin 3. mai verður dagurin hildin í heiminum. Øll eru vælkomin frá kl. 15.00

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 14. mai 2008 hava Dorit og Kjartan S. Jensen, Oyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 17. mai kl. 18.30. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum verða biðin at siga frá í seinasta lagi 4. mai á tlf. 422283 ella 224605.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 14. mai hava Gunnvá og Bjarki Magnussen, Húsavík, silvurbrúdleyp. Veitslan verður hildin á Keldu í Skálavík leygardagin 17. mai kl. 18.30. Tey, ið vilja gleða okkum við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá innan 7. mai á tlf. 361371 ella 280371.

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 7. mai 2008 hava Andrea og Jónsvein Eliassen, Leirvík silvurbrúdleyp. Dagurin verðu rhildin í bygdarhúsinum í Leirvík leygardagin 10. mai kl. 19.00. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum, verða biðin um at siga frá, áðrenn 4. mai á tlf. 443231 ella 273099.

**Brúdleyp**
Leygardagin 26. apríl kl. 16 giftast í Viðareiðis kirkju, Jóhan Heini Hejnesen og Malena Petersen. Vælkomst verður í heiminum frá kl.19.

**Konfirmatiónir í Danmark**
Sunnudagin 27. apríl verður Vernar Hentze úr Skopun, sonur Poul Johan Danielsen og Mariu Hentze, konfirmeraður í Hirtshals kirkju.
Adr. er Kornvænget 21, Uggerby, 9800 Hjørring.

Sunnudagin 4. mai verður Eydna Guðrun Gudmundson fermd í Lunderskov kirke. Adressan er Jættehøj 5, Lunderskov.


Hendan fitta genta verður konfirmerað í Langenæs Kirke í Aarhus sunnudagin 27. apríl kl. 10.00. Aftaná eru øll hjartaliga vælkomin heim á Langenæs Allé 68, kl. tv., 8000 Aarhus C til ein góðan bita.

# HEILSANIR


**Góði elskaði Jónas**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 19. apríl. Eisini ein heilsan til Lis. Jesus pápi gevi tykkum eina ljósa og góða framtíð.
**Omma, abbi og mostir**


**Góði abbi**
Hjartaliga tillukku við 65 ára degnum.
**Heilsan Elsa, Otto og Astrið**


**Elskaða Amy**
Hjartaliga tillukku við 4 ára degnum í dag. Nógvar mussar og klemm til tín og Marthu.
**Omma og abbi í Lorvík**


**Góði elskaði Símun**
Omma og abbi ynskja tær hjartaliga tillukku við føðingar-degnum í dag. Vit elska teg.
**Heilsan omma og abbi á Argjum**

Sosialurin
Heilsanir
kr. 30,-

**Gevið gætur**
Bert heilsanir, skrivaðar á henda lepan og goldnar frammanundan við kr. 30,- fáa innivist í blaðnum. Til ber eisini at lata okkum lepan og gjald í avgreiðsluni á Tórsgøtu 1, millum kl. 8.00 og 16.00

**Myndaheilsanir skulu vera okkum í hendi á miðdegi 1 dag fyri útkomudag.** Viðmerkið annars niðanfyri, um heilsanin ynskist í blaðið ávísan dag.

☐ Mán. ☐ Týs. ☐ Mik. ☐ Hós. ☐ Frí.

Tekstur: ________________________________________

________________________________________

**Myndina aftur:** Minnist til at skriva navn og bústað aftanfyri á myndina og leggja við ein frankeraðan brævbjálva við navni og bústaði. Um neyðugt fyri arbeiðsgongdina, taka vit okkum rætt til at fáa heilsanina í blaðið annan dag, enn tann ynskta.

Sent hevur (skal fyllast út).
Navn: ________________________
Bústaður: ________________________
Bygd/býur: ________________ Tlf.: ____________

Sendið lepan, v/mynd og gjald til:
Sosialurin Postsmoga 76 · 110 Tórshavn
Merkið brævbjálvan: >>Heilsanir<<


**Góði fitti Jónas**
Hjartaliga tillukku við 2 ára degnum tann 19. apríl. Takk fyri allar tær stuttligu løturnar vit hava saman. Didda elskar teg.
**Heilsan systur tín Lis**


**Góði elskaði Jónas**
Mamma og babba ynskja tær hjartaliga tillukku við 2 ára degnum 19. apríl. Má Jesus pápi geva tær eina ljósa og góða framtíð. Vit elska teg.
**Heilsan mamma og babba**